# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð

## Bygdarráðsfundur tann 24. apríl 2013, kl. 19⁰⁰.

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Karl A. Olsen, Hilbert Elisson, Malan Stórá, Durita á Heygum, Herit Magnussen og John Zachariassen

**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 18**
Tilmæli frá Teknisku nevnd viðvíkjandi parkeringsplássi við Byrgisveg.
J.nr. 2013-046

Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi 16. apríl 2013 innkomin tilboð upp á arbeiðið at gera parkeringspláss við Byrgisveg og støðutakan til, um kommunan skal ognast lendi bururav matr. nr. 109c hjá Marjun og Hans Olsen.

Nevndin samtykti at taka av tilboð frá Sp/f Kreton v/ Ova Magnussen upp á kr. 146.760 + kr. 40.000.

Nevndin mælir til

- at tikið verður av tilboði frá Marjun S. Olsen uppá 35.000 kr fyri part av ogn teirra matr. nr. 109c
- at bíðað verður við asfalteringini treytað av, at 50.000 kr verða avsettar til hetta arbeiði á fíggjarætlanini fyri 2014.

**Viðv. 18**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 19**
Tilmæli frá Teknisku nevnd um nummerering av málum í gerðabøkrunum.
J.nr. 2013-053

Tekniska nevnd viðgjørdi á fundi 16. apríl 2013 nummerering av málum í gerðabøkrunum.

Nevndin mælir til at hava framhaldandi nummerering.

**Viðv. 19**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 20**
Tilmæli frá Havnarnevndini um umsókn um leigusáttmála og -øki til go-kartbreyt.
J.nr. 2013-054

Havnarnevndin viðgjørdi á fundi 15. apríl 2013 umsókn frá Magna V. Mouritsen vegna smápartafelag undir stovnan um leiguøki til go-kartbreyt.

Nevndin mælir til at leiga Sp/f undir stovnan hóskandi øki. Uppskot til leigusáttmála verður at gera klárt til komandi bygdarráðsfund.

**Viðv. 20**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 21**
Tilmæli frá Havnarnevndini um umsókn um loyvi til at gera nýtslu av økinum vestan fyri VestPack til frítíðar- og ferðavinnuendamál.

Havnarnevndin viðgjørdi á fundi 15. apríl 2013 umsókn frá Agnar Joensen vegna smápartafelag undir stovnan um loyvi til at gera nýtslu av økinum vestan fyri VestPack til frítíðar- og ferðavinnuendamál (m.a. paintball).

Nevndin mælir til at leiga smápartafelagnum undir stovnan hóskandi øki. Uppskot til leigusáttmála verður at gera klárt til komandi bygdarráðsfund.

**Viðv. 21**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 21.45.

Sign.:

Pauli T. Petersen Karl A. Olsen Hilbert Elisson

Malan Stórá Durita á Heygum Herit Magnussen John Zachariassen